## VIÐMERKINGAR

# Tak teg saman Dagfinn!

**Hans Jákup Eiðisgarð**

Tað munnu vera mong EB/Streyma-viðhaldsfólk, sum minnast aftur á dystin millum EB/Streym og B36 seinasta ár á mølini við tungun sinni. Ikki bara tí EB/Streymur tapti dystin, men serliga tí at úrslitið lættliga kundi havt verið eitt heilt annað. Støðan var 2-0 til útiliðið, tá ið ein EB/Streyma-leikari einar 15 minuttir fyri leiklok smekkar til úr umleið 20 metrum. Bólturin støkkur í hondina á Pól Thorsteinsson (um eg ikki fari heilt skeivur), sum loypur fram ímóti skotinum við báðum hondum omanfyri andlitið. "Einki", sigur dómarin. Sera óheppið tá ið hugsað verður um, at hetta var ein góður møguleiki fyri mótpartin at koma innaftur í dystin.

Dagfinn Olsen, ið var dómari hendan dagin, hevur seinni viðgingið sítt mistak eftir at hava sæð sjónbanda upptøkur, men lítið sær tað út til at hava hjálpt honum í síni døming. Dagfinn var nemliga eisini dómari, tá ið EB/Streymur og B36 møttust í avgerandi dystinum á mølini seinasta sunnudag, og ikki kann sigast annað, enn at hann kom sera, sera illa frá uppgávuni, men tað sum serliga fekk blóðið at kóka hjá flestu EB/Streymaviðhaldsfólkunum, og harvið eisini mær sjálvum, var tá ið eitt horna kom innfyri úr høgru síðu, nakað eftir at EB/Streymur hevði javnað til 1-1, og dysturin aftur var púra opin. Bólturin blívur skallaður ímóti B36-málinum, har Pól Thorsteinsson (mín sann, enn einaferð) stendur á strikuni og slær bóltin vekk við yvirarminum, men ístaðin fyri at døma brotsspark, og geva Póli tað reyða kortið, endaði tað við at Pacek hjá EB/Streymi bleiv útvístur eftir at hava sagt sína meining.

Enn einaferð ein sera óheppin avgerð hjá Dagfinni, sum eisini vísti seg at hava avgerandi týdning fyri dystin, og endastríðið hjá EB/Streymi sum heild. Men hvussu ber tað til, at Dagfinn ikki dømir? Torir hann ikki? Ella sær hann tað ikki (heldur ikki hesaferð)? Óansæð svarið, og hansara »ynkiliga pástand« í 3-2, so er eitt heilt sikkurt, og tað er at dømingin heilt einfalt ikki er góð nokk. Ikki bara hesaferð, men alt ov ofta.

Hetta er alt annað enn "fair" móti leikarum, ið hava vant hart og miðvíst í langa tíð fyri at røkka einum máli, bert fyri at síggja hetta gleppa av hondum av tilvildarligari og "út um alt mark" vánaligari døming.

Tað er sjálvandi skiljandi, at Dagfinn hálvgrætur í 3-2 eftir at hava verið álopin eftir dyst á Tvøroyri, tí tað átti hóast alt ikki at farið so vítt. Tað er tó undrunarvert at leggja merki til, at hann ferð eftir ferð elvir til slíkan ruðuleika kring vøllin, og eg haldi at Dagfinn, í øllum førum, má síggja buh'ini í ljóðaðu kring vøllin eftir dystin á mølini sum eina ábending um eitt alt annað enn nøktandi avrik, har hann ígjøgnum allan dystin helt eina sera ógreiða linju, og í fleiri førum tók heldur ivasamar avgerðir.

Sannleikin er í roynd og veru tann, at dømingin í Føroyum er alt ov vánalig, og tað er langtfrá bara Dagfinn, sum ferð eftir ferð kemur illa frá dømingini. Tað sæst javnan á sjónbandapptøkunum í 3-2. Og herfrá skal tað heldur ikki ljóða, sum um tað bara eru EB/Streymur, sum vera snýttir fyri bæði eitt og annað. Eitt dømi um hetta, var málið hjá Gert sum legði EB/Streym á odda 2-0 ímóti TB, har Gert týðiliga fekk bóltin í hondina áðrenn hann skoraði. Enn eitt klokkuklárt dømi um, at dømingin í føroyskum fótbólti er alt ov vánalig, men hetta skal Dagfinn so ikki lastast fyri, tí hendan dystin dømdi hann ikki. Og eitt annað kann Dagfinn hóast alt eisini gleðast um, og tað er at bæði Lassin Isaksen og Páll Augustinussen eru enn vánaligari dómarar enn hann sjálvur, og tað sigur ikki so lítið.

# Tað skal loysa seg at leiga út

**Fólkafloksungdómur**

Um tað loysir seg at leiga út, so loysir tað seg eisini at leiga.

Í hesum døgum verður nógv tosað um, at Landsstýrið ætlar at selja íbúðarbygningarnar við Landssjúkrahúsið. Landsfelag Føroyinga í Útbúgving (LFÚ), mælir til, at gera hesar bygningar um til bústað til ung lesandi.

Fólkafloksungdómur hevur tó eitt annað uppskot.

**LFÚ samd við Fólkafloksungdóm**

Fólkafloksungdómur hevur verið á fundi við LFÚ har ið feløgini blivu samd um, at um skatturin av at leiga út bleiv lækkaður, so hevði hetta m.a. gagnað teimum lesandi, tí útboðið av leigumálum, bæði íbúðum og kømurum hevði blivið størri og tí vildi prísurin tí lækkað.

**Útbúgving neyðug**

Fyri eitt land sum Føroyar er tað alneyðugt, at tey sum velja at lesa í Føroyum hava eins góðar møguleikar sum uttanlands. Fólkafloksungdómur sær tað tó ikki sum nakrað forðing, at føroyingar velja at fara undir lesnað uttanlands, men tað skal ikki vera nakar trupulleiki av at koma aftur til Føroya, tí útboði at íbúðum og kømurum er dýrt og avmarkað.

**Nokk at plássi til**

Tað eru rættiliga nógv sum hava so mikið stór hús, at tað væl hevði borið til at leiga út, men av tí at tað ikki loysir seg, so lata tey vera. Munurin á føroyskum og donskum viðurskiftum er m.a. at í Keypmannahavn er ikki vanligt at hava hús inni býnum sum tað er í Føroyum, tað eru nógv fleiri íbúðarblokkar og tí ikki so vanligt at leiga partar av sethúsum út. Í Føroyum eru flestu sethús so mikið stór, at tað væl er møguligt at leiga partar út.

Í Stavanger og Oslo hevur man m.a gjørt tað, at upp til 50% at einum sethúsum kunnu leigast út skattafrítt, umframt, at viðkomandi sleppur frá at uppgeva roknskap. Tey sum leiga meira enn tað út, skulu lata roknskap inn og skattast av hesari inntøku hægri enn 50%. Hetta hevði við sær at útboði bleiv nógv størri og tískil gjørdi tað í stóran mun møguligt hjá lesandi at leiga.

**»Win-win« støða**

Um hugt verður eftir teimum norsku brosjurum av sniðhúsum í Noregi, so er í flestu førðum lagt upp til, at íbúð verður gjørd. Sjálvt um íløgan er tað størri, so loysir tað seg fyri viðkomandi og tí hækkar útboði av leigligheitum.

**Oljuprísurin**

Fjølmiðlarnir hava gjørt vart við, at eitt vanligt húsarhald skal gjalda 600,- eyka um mánaðin í olju og tí er tað upplagt at leiga út. Men tá ið tað ikki loysir seg, at leiga út, so heldur tað fólki aftur.

Vit meta, at tað snøgt sagt ikki loysir seg at leiga út. Umframt, at størsti parturin at teimum sum leiga út gera tað "svart".

**Bústaðarpakkin**

Uppskoti um Bústaðarpakkan hjá Samgonguni stendur m.a., at "Skattalóggávan verður broytt soleiðis, at skattingin av leiguinntøkui, ið stavar frá útleigu til privatar bústaðir, verður sett á ta støði sum vanligur partafelagsskattur".

Hesum uppskoti tekur Fólkafloksungdómur undir við og vónað at hetta uppskot verður samtykt skjótast gjørligt. Tí tað er alneyðugt, at fáa viðurskiftini í lag hjá teimum ungu og lesandi í Føroyum.

# Nei, kór í heimsklassa halda vit okkum ikki vera

**Ólavur Hátún**



– og tí var útsøgnin í útvarpinum »Bara tey bestu sleppa við« heldu ikki mín orðing.

Hinvegin eru vit takksom fyri, at fjølmiðlar vísa tí heiðuri ans, sum okkara kóri er fallið í lut, og vit vóna við hesum høvi at kunna umboða land og fólk á virðiligan hátt.


BYGGIBÚÐ

damor




Loftstrappa
- B x L : 70 x 120 cm
- 3 deildan stiga
- longd 280 cm
- lastar upp til 260 kg
- Hvítan botn
Einans 998,-




Karcher Trýstspulari
- Sera dygdargóður trýstspulari
- 100 bar
- ein sjálvinstillandi dysa fylgjir við
- við sápu intaki




Flytikassar
- Stødd: L x B x H: 57x38x35 cm
- Dubultan Botn
- Sera sterkur




Baðirúmsmøbil
- Farva : Hvítt háglans
- B x D : 75 x 51 cm
- við spegli og ljós baldakin
- Uttan krana

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor